# Fíggjarfulltrúi

eilsumálaráðið



ıt

Sum fíggjarfulltrúi í Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands, at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti, umframt at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Heilsumálaráðið sum heild.

FØRLEIKAKRØV
Tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, so sum cand. polit., cand. oecon. ella cand. scient. pol., ella aðra viðkomandi útbúgving.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar fíggjarligar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Harumframt vænta vit at tú hevur góðan kunnleika til teldur, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum. At tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

AVBJÓÐANDI STARV
Starvið sum fíggjarfulltrúi í Heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

Fyri framman eru nógvar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini í Heilsumálaráðnum. Talan er fyrst og fremst um, at ansa eftir útreiðslunum til serviðgerð uttanlands. Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í sambandi við at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

LØNAR- OG SETANARTREYTIR
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

NÆRRI UPPLÝSING
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo.

UMSÓKN
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Heilsumálaráðið, Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

FREIST
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. oktober 2008, kl. 12:00.

KREA

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45
ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

BILRØKT
Borgar fyri góðsku...



**Hesin flotti Jaguar XJ6-4.2**
verður seldur um hóskandi boð fæst. Bilurin er í sera góðum standi. Altíð koyrt í Føroyum, fyrstu ferð skrásettur 21. juni í 1978. Hevur einans koyrt 28.400 km. Hevur aut. gear, el rútar, leðursetur, servo, klima, træinteriør o. a. Fá meira at vita um bilin hjá Bilrøkt í Havn

**Stiðjagøta 3 - Postsmoga 1234 - tel 588880 - fax 318380**
**www.bilrokt.fo - bilrokt@bilrokt.fo**

Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

QUALITY INNOVATION RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir laks og liðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES.
Tað starvast umleið 200 fólk í samtakinum.

# Bókhaldari

**Vit sóknast eftir einum bókhaldara til Bakkafrost samtakið.**

Uppgávurnar eru serliga bókhaldsuppgávur fyri feløgini í samtakinum, sosum at bóka skjøl, at avstemma og aðrar fyrifallandi uppgávur. Tú kemur at starvast við tilvísing til roknskaparleiðaran.

Vit brúka bókhaldsforritið Lundan og annars vanlig telduforrit í Office skipanini.

**Førleikakrøv:**
- Royndir frá líknandi starvi
- Góðan kunnleika í teldunýtslu
- Fyrikomandi, góð samstarvs- og samskiftisevni

**Umsóknarfreist:** 28/10-2008

Umsóknir kunnu sendast til
Bakkafrost@bakkafrost.com ella til:
Bakkafrost p/f, 625 Glyvrar

**Starvsstaður:** Á Glyvrum

Bakkavegur 8
FO-625 Glyvrar
Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com
www.bakkafrost.com

BAKKA FROST